Alzheimerfelagið

## Miðstøðin fyri minnisveik í Havn søkir 2 starvsfólk

Miðstøðin fyri minnisveik, er ein royndarverkætlan, sum Alzheimerfelagið hevur tikið stig til. Verkætlanin verður fíggjað av Almannamálaráðnum og Tórshavnar kommunu.

Miðstøðin fevnir m.a. um eitt dagtilhald fyri minnisveik, ráðgeving til persónar við demens og teirra avvarðandi, og um vikuskiftini verður av og á café. Miðstøðin hevur leigað eini vælhóskandi hús til endamálið miðbýnum.

Fyrst verður farið undir dagtilhaldið, har 8 fólk kunnu vera samstundis. Dagtilhaldið er ætlað heimabúgvandi persónum við demens í dagtímunum vanligar yrkadagar. Trý fara at starvast í dagtilhaldinum. Miðstøðin fer at leggja seg eftir at arbeiða eftir nýggjastu umsorgarteorium, sum stimbrar tann sjúka psykososialt. Henda uppgávan krevur starvsfólk, sum hava áhuga at arbeiða við minnisveikum fólkum.

**Søkt verður eftir tveimum starvsfólkum** til setan 1. september 2004 ella eftir avtalu. Størvini eru tíðaravmarkaði til 30. juni 2006, samsvarandi játtanini til royndarverkætlanina.

**Førleikakrøv til umsøkjaran:**
- hug og hegni at vera um persónar við demens
- ávísa vitan innan demens
- støðugt at vilja dagføra kunnleikan innan demensøkið
- skal vera sjálvstøðugur og kreativur
- góð samstarvsevni
- hava tol og empati

Til størvini krevst útbúgving sum sjúkrarøktarfrøðingur, ergoterapeutur, heilsuhjálpari/atstøðingur, pedagogur ella onnur líknandi útbúgving. Tað er ein fyrimunur at hava eftirútbúgving sum demenssamskipari. Dentur verður lagdur á starvsroyndir.

**Vit bjóða:**
- eitt áhugavert og avbjóðandi starv, har tú ført møguleika frá byrjan, at seta dám á stovnin
- eitt starv har tú ert við til at virka fyri at røkka settu málum
- møguleika fyri menniskjaligari og fakligari menning

Talan er um tvey fulltíðarstørv við arbeiðstíð vanligar yrkadagar í dagtímunum. Niðursett tíð kann møguliga koma uppá tal.

**Setunarviðurskifti:**
Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag

Meiri fæst at vita um størvini við at venda sær til Ernu Háberg, projektleiðara tlf. 228004 ella 316350

Umsóknarfreistin er **leygardagin 14. august 2004.**

Skrivlig umsókn saman við viðmælum, royndum og upplýsing um útbúgving v.m. skulu sendast til:

**Alzheimerfelagið**
**Tórsbyrgi 16**
**100 Tórshavn**




**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3817
Navn: Sp/f Tórshavnar Maskinhandil
Adressa: Varðagøta 29-30, 100 Tórshavn
Kommuna: Tórshavnar Kommuna
Stovningardato: 28.06.2004
Viðtøkudato: 28.06.2004
Kapitalur: Kr. 200.000,00
Inngjaldingarháttur: Kr. 200.000,00 í øðrum virðum til kurs 1000.
Stovnari: Tummas Andreasen, Varðagøta 32, 100 Tórshavn.
Stjórn: Øssur Janus Andreasen, Varðagøta 32, 100 Tórshavn og Svend Emil Andreasen, Varðabú 26, 100 Tórshavn.
Tekningarreglur: Felagið verður bundið við undirskrift av tveimum stjórum saman.
Grannskoðari: Sp/f KPMG, statsaut. revisorar, Staravegur 17, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12.
Fyrsta roknskaparár: 01.01.2004 - 31.12.2004
Endamál: Endamál felagsins er at reka handil, ídnað, handverk o.a. virksemi í hesum sambandi.
Felagið er stovnað við umskipan av virki eftir umskipanarlógini.

Skráseting Føroya tann 20. juli 2004

Kristin Balle

Vegna broytingar í vøruúrvælinum verður goymslan umskipað tessvegna selja vit við STÓRUM AVSLÁTTRI partar av goymsluni

Talan er um : Máling, tapet, gólvrestir, tundurgólv, smáteppir, máttur, flísar og kina møblar

RING 316066
máling & gólv
Fyribils eru vit at hitta á Bóndaheygi 4

Nakað av goymsluni ætla vit at halda áfram við, og er tí ikki partur av goymslutømingini
- tó fáa tey ið keypa hesar vørur eyka avsláttur um tey keypa av restgoymsluni

TIL DØMIS:
TAPET FYRI 0,- kr

Sosialurin 341800

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi partafelag:**

Skrásetingar-nr. P/F 3818
Navn: P/F 15. juni 2004
Adressa: Húsagøta 3, 100 Tórshavn
Kommuna: Tórshavnar Kommuna
Stovningardato: 15.06.2004
Viðtøkudato: 15.06.2004
Kapitalur: Kr. 3.000.000,00
Inngjaldingarháttur: Kontant kr. 3.000.000,00 til kurs 100.
Stovnari: P/F FB Holding, 100 Tórshavn (P/F 3761).
Nevnd: Christian Andreasen, Høvdagøta 6, 160 Argir (formaður), Óli Mortensen, Orknoyarvegur 6, 100 Tórshavn og Johan Djurhuus, Korkagøta 4, 100 Tórshavn.
Stjórn: Bogi Jacobsen, Miðrás 5, 100 Tórshavn.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av allari nevndini ella av nevndarformanninum saman við stjórnini.
Grannskoðari: Sp/f KPMG, statsaut. revisorar, Staravegur 17, 100 Tórshavn og P/F Rasmussen & Weihe, á Glaðsheyggi, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12.
Fyrsta roknskaparár: 15.06.2004 - 31.12.2004
Endamál: Endamál felagsins er at ogna sær kapitalpartar í vinnufyritøkum, við tí fyri eyga at endurskipa vinnufyritøkuna og hereftir selja fyritøkuna.

Skráseting Føroya tann 20. juli 2004

Kristin Balle

i
Sosialurin

Sosialurin
Lesið Sosialin
-tað loysir seg!

# ítróttur

Nr. 139 • fríggjadagur • 23. juli 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

# Sensatiónin lúrdi

**HB smurdi ikki serliga sannførandi georgiska mótstøðuliðið av 3-0, og nú er tað væl skiljandi, at teir í meistaraliðnum iðra seg um, at teir ikki kendu sína vitjanartíð og vunnu uppaftur størri sigur og harvið rættin at halda fram í kappingini**

CHAMPIONS LEAGUE
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Eftir 5-0 tapið í Georgia sá tað vónleyst út hjá HB. Eftir 3-0 sigurin á Tórsvølli mikukvøldið kann ein ikki lata verða við at spyrja, hvussu í allari víðu verð HB bar seg at við at tapa so stórt fyri georgiska liðnum á útivølli.

Georgiska liðið hevði ikki nógv at bjóða uppá. Teir vóru óivað nøgdir við at fáa ein javnleik, og tí lógu teir rættuliga aftarlaga á vøllinum. Framrættaða spælið hjá FC Wit gekk fyri tað mesta fyri seg soleiðis, at langar sendingar vórðu oystar fram ímóti stóra framherjanum Gaschasvili, men hann noyddist í allarflestu førum at lúta í luftini fyri einum sera vælleikandi Símun Eliasen.

Eftir fínu løtuna í dýrdarveðrinum, sum tað tíverri ikki vóru fleiri enn gott og væl sjey hundrað eygnavitni til, sjálvt um HB var í førðingardagshýri og bjóðaði øllum at koma inn uttan at gjalda, kann niðurstøðan ikki verða øðrvísi, enn at HB samantalt tapti fyrst og fremst fyri sær sjálvum. Teir uppdagaðu ov seint mikukvøldið, at hetta mótstøðuliðið avgjørt var at tosa við, og teir gjørdu ov nógv persónlig mistøk á steikipannuni í Georgia. Nú er hetta rættuliga, rættuliga harmuligt.

Ikki minst er tað at iðra seg yvir, at HB kundi havt verið uppaftur betri fyri, um teirra vandamiklasti maður, Rógvi Jacobsen, ikki hevði havt verið leikbannaður í báðum dystunum, tí hann í fjør fekk reytt kort.



*19 ára gamli Eli Thorstensson, Ið einans hevur verið á vøllinum í fimm minuttir, smekkar til, og so er HB á odda 1-0*
*mynd: Jens Kr. Vang*

### Ungt álop

HB liðið var nakað broytt sammett við tað í Georgia. Í fyrra dystinum leikti HB við fimm monnum á miðvøllinum og einum heilt har frammi. Mikukvøldið vóru teir fýra á miðvøllinum og tveir á álopinum. Emil Nolsøe Leifsson og leikandi venjarin Heine Fernandez, sum hevur trupulleikar í rygginum, vóru hesa ferð á beinkin. Í teirra stað spældu ungu menninir Páll M. Joensen og Hendrik Rubeksen, sum mannaðu álopið.

Longu frá fyrsta bríksli sást, at HB ætlaði sær sigurin. HB legði trýst á mótstøðumenninar langt frammi á vøllinum,. Miðvøllurin var uppsettur, verjuparturin avgjørdur, og álopsmenninir arbeiddu sum hestar, so georgisku mótstøðumenninir ongantíð fingu frið at spæla bóltin ímillum sín.

Heimaliðið fekk alt størri yvirvág, sum fyrri hálvleikur leið, og fleiri ferðir leikaði ógvuliga hart á framman fyri málinum hjá FC Wit. Einar fýra ella fimm ferðir í fyrra hálvleiki hevði HB atsóknir á georgiska málið, sum við eitt sindur av hepni kundu givið mál og viðhvørt áttu at givið mál. Men kanska var tað restandi royndir í altjóða uppgávum hjá ungu monnunum, sum høvdu við sær, at neyvleikin ikki var nóg dyggur.

### Jákup borin út

Stutt fyri hálvleik gjørdist tað heila eitt sindur dramatiskt. Fyrst bleiv Jákup á Borg borin av vølli við skaða, sum hann fekk eftir eitt hendiligt óhapp, har hann lendi skeivt á fótinum, eftir at hann hevði verið í luftdysti við georgiskan verjuleikara. Tað sá álvarsamt út, og einki er at ivast í, at missurin í honum kann verða stórur.

Tveir minuttir fyri seinasta bríksli í 1. hálvleiki vóru georgisku meistararnir skerdir. Janus Joensen vann bóltin kontant av miðvallaranum Martsvaladze, sum gjørdist í øðini og sparkaði eftir Janusi, sum hevði spælt bóltin víðari. Írski dómarin var ikki í iva, og reyða kortið kom upp úr buksulummanum.

Útvísingin hevði sjálvandi við sær, at fyritreytirnar hjá HB styrknaðu undan seinna umfarinum.

### Ungu eykamenninir settu hol á

Eftir steðgin spenti HB álopsbogan. Verjuleikarin Vagnur M. Mortensen varð fluttur í høgra borð á miðvøllinum. Hetta vísti seg at vera skilagóð avgerð, tí nógvar vandamiklar støður spurdust burtur úr uppleggum frá júst honum.

Í roynd at leggja uppaftur størri trýst á FC Wit setti HB stóra unglingaleikaran Eli Thorsteinsson á vøllin fyri álopsspælaran Hendrik Rubeksen. Eli, ið vanliga er verjuleikari, bleiv sendur heilt fram í álopi, har hann kundi bjóða georgisku verjuni av í luftini. Hetta vísti seg at vera skilagott, tí beinan vegin gjørdist verjan hjá FC Wit nógv ótryggari.

Júst Eli Thorsteinsson var eisini maðurin, sum setti hol á, tá ið 65. minuttir vóru farnir. Ein sending varð løgd fram móti Eli, sum var staddur í vinstra borði av brotsteiginum, og unglingaleikarin slapp inn um georgiska verjuleikaran, áðrenn hann smekkaði í kassan. Fantastiska gott mál av unga manningum, sum bara hevði verið lítla løtu á vøllinum, og sum longu frammanundan málinum hevði havt góðan møguleika.

Tríggjar minuttir seinni økti HB um leiðsluna. Rókur av Fløtum Jespersen, sum var komin á vøllin fyri Jákup á Borg, fekk bóltin áraka brotsteigarmarkið eftir eitt sindur av trunkaspæli. Hann var avgjørdur, smekkaði til, og bólturin small í netmeskarnar, og so var 2-0, og HB tevjaði blóð.

Í Europa Cup høpi er tað ikki vanligt, at tað eru føroysku liðini, sum trýsta, men soleiðis var tað seinna partin av seinna umfarinum. Talan var um støðugt og tungt HB álop. Miðverjin, Símun Eliasen, sum síðstu løtuna var í álopinum, økti til 3-0, tá ið tað restaðu tveir minuttir. Møguleikar vóru til bæði fýra og fimm mál afturat ímóti mótstøðuliðnum, sum var máttleyst og ikki visti síni livandi ráð. Teir vóru komnir henda vegin at dyrgja eftir javnleiki og so kanska at skora eitt mál. Nú vóru teir í tí støðuni, at teir høvdu tapt, og tað kendist væl, at teir síðstu løtuna vóru bangnir fyri, at teir skuldu missa 5-0 leiðsluna frá heimadystinum.

### Óskiljandi stórtap

At HB skal hava tapt so mikið stórt fyri FC Wit á útivølli, er ilt at skilja. Onkur helt fyri, at tað mundi verða eitt eykalið hjá georgiumonnum, sum var á vøllinum mikukvøldið í Havn, men tað vísti seg, at FC Wit bert hevði gjørt eina broyting sammett við fyrra dystin.

Hesa ferð var HB í hvussu so er ein klassa betur enn mótstøðuliðið, ið nærum ongar atsóknir hevði á HB-málið. At FC Wit fekk ein mann riknan av vølli beint fyri hálvleik taldi rætta vegin fyri HB, men tað sigur ikki alt.

Hagtølini vísa , at fyrstu 45 minuttirnar hevði HB níggju hornaspørk, meðan FC Wit einki hevði, og tað sigur ikki so lítið!

Eftir dystin helt HB liðformaðurin, Rúni Nolsøe, eisini, at tað var ein vanlukka, at teir høvdu tapt so stórt í Georgia. Hann ivaðist eisini í, nær HB aftur fær ein slíkan møguleika at spæla seg víðari í Europa Cup.

Hjálparvenjarin hjá Wisla Krakow, polska mótstøðuliðið hjá FC Wit í næsta umfarinum, sum var millum áskoðararnar á Tórsvølli mikukvøldið, tóktist eisini verða fegin um, at tað er FC Wit og ikki HB, sum teir skulu dystast ímóti.

HB vísti framúr avrik, sum allur tann føroyski fótbóltsheimurin kann fegnast um. Men samstundis er væl skiljandi, at tey í HB iðra seg. Málið hjá teimum hevur í fleiri ár verið sum tað fyrsta føroyska felagið at spæla seg víðari til næsta innleiðandi umfarið í Europa Cup. Hesa ferð høvdu teir møguleikan. Teir tóku av á heimavølli, men byrðan, sum teir komu við av útivølli, var ov stór. Tíverri!

### FAKTA

HB - FC Wit 3-0 (0-0)
Mikudagin 21. juli 2004, kl. 19.00 á Tòrsvøllli. Fyrsta innleiðandi umfarið í Champions League, seinni dystur. 752 áskoðarar.
Dómarabólkur úr Írlandi: Ian Stokes, Barry Martin McDonnel, Anthony Ryan, Paul Tuite.
1-0 Eli Thorsteinsson 65.
2-0 Rókur av Fløtum Jespersen 68.
3-0 Símun Eliasen 88.

HB: 23. Danny Rasmussen - 18. Hallur Danielsen (64. Rasmus Nolsøe), 19. Vagnur M. Mortensen, 15. Símun Eliasen, 4. Janus Joensen - 9. Jákup á Borg (10. Rókur av Fløtum Jespersen 45.), 14. Kári Nielsen, 7. Rúni Nolsøe, liðformaður, 20. Heðin á Lakjuni - 24. Páll M. Joensen, 22. Hendrik Rubeksen (3. Eli Thorsteinsson 60.)
Á beinkinum uttan at verða skiftir inn: 21. Pól N. Joensen, 12. Emil N. Leifsson.
Venjari: Heine Fernandez
Hjálparvenjari: Oddbjørn Joensen
Málmansvenjari: Sámal Hansen
Liðleiðari: Sigurð Hansen
Fysioterapeutur: Klæmint Isaksen
Gult kort: Vagnur M. Mortensen 6.
FC Wit: 1. Davit Mamardashvili - 20. Davle Datunaishvili, 4. Tengiz Kobiashvili, 24. Alexander Intskirveli, 2. David Imedashvili - 22. Otar Martsvaladze, 9. Lasha Nozadze, liðformaður, 18. Davit Digmelashvili, 21. Oleg Gvelesiani - 10. Vladimer Gachasvili (14. Irakli Malichava 89.), 23. Irakli Ebandidze (11. Zaza Sakhokia 52.)
Á beinkinum uttan at verða skiftir inn: 12. Mihaili Mujrishvili, 17. George Kvakhadze, 15. Levan Kvaratskhelia
Venjari: Merab Kochalsvili
Hjálparvenjari: David Onodrishvili
Liðleiðari: Sondo Lomidze
Fysioterapeutur: Roland Khvadagiani
Reytt kort: Otar Martsvaladze 43.